





# Løgreglumaður skallaður

Løgreglan var leygarnáttina tilkallað, tí ófriður var uttanfyri eitt vertshús í miðbýnum. Tá løgreglumennirnir komu á staðið, tosaðu teir við fólkið, ið gjørdi ófriðin, men ein av monnunum skallaði ein av løgreglumonnunum. Maðurin varð handtikin og skuldsettur fyri harðskap móti tænastumanni. Løgreglumaðurin fekk ongan skaða.

Leygarnáttina var herverk gjørt á politistøðina í Havn. Ein maður hevði verið handtikin, men tá hann varð leyslatin, breyt hann ein rút á politistøðini. Hann varð handtikin aftur og skuldsettur fyri herverk.

Ein bilførari var tikin í Kaldbaksbotni fyri at koyra ov skjótt. Hann koyrdi 124 km/t og skal til nýggja koyriroynd. Ein annar bilførari var tikin í Havn fyri at koyra ávirkaður av heilivági.

**- ella**

# Eldur í bili

Av løgreglustøðini í Runavík, siga tey, at vikuskiftið hevur verið friðarligt.

Í morgun var eldur í einum bili í Fuglafirði. Sløkkiliðið sløkti eldin, sum ikki var stórur. Eingin skaði stóðst av eldinum. Av løgreglustøðini siga tey, at eldurin stóðst av einum tekniskum breki í bilinum.

Fríggjadagin vóru løgreglumenn á Kambsdali og skrivaðu 23 parkeringsbøtur uttanfyri Studentaskúlan og Handilsskúlan.

**- ella**

